Mikudagur 11. mai 2011 · Nr. 54

# Hevur tú hálvsystkin í útlondum?

**MANNTAL Uppskotið um manntal, sum Løgtingið tekur støðu til í hesum døgum, er í stríð við bæði altjóða sáttmálar og grundlógina, metir minnilutin í fíggjarnevndini, sum fær stuðul frá løgfrøðisligum ráðgeva. Meirilutin í fíggjarnevndini og kunningarráðgevin hjá teimum, sum hava staðið fyri verkætlanini, vísa skuldsetingunum aftur**



Finnur Jensen

Tað hendi í teimum døgum, at allur heimurin skuldi verða skrivaður í manntal.

Í Føroyum hendir tað væntandi í heyst.

Men tað er ikki vist. Tí fyrst skal eitt lógaruppskot, sum slóðar fyri umfatandi fólkateljingini, endaliga samtykkjast í løgtinginum.

Uppskotið er umstrítt.

Meðan meirilutin í Fíggjarnevndini og tey, sum hava staðið fyri verkætlanini, verja uppskotið, fær tað av grovfíluni frá bæði fíggjarnevndarminnilutanum og løgtingsumsitingini.

Eitt er, at minnilutin metir, at sjálv verkætlanin, sum íalt kostar 11,5 milliónir krónur, er ov dýr í mun til hennara nyttuvirði.

Eitt annað er, at bæði minnilutin í fíggjarnevndini og ein løgfrøðiligur ráðgevi hjá løgtingsumsitingini eru samd um, at lógaruppskotið stríðir við fleiri altjóða sáttmálar.

Orsøkirnar eru fleiri.

## Umfatandi spurnablað

Manntalsætlanin snýr seg í stuttum um at gera eina neyva hagtalslýsing av føroyska samfelagnum. Í hesum sambandi er eitt umfatandi spurnablað gjørt, sum allir føroyingar skulu svara í heyst.

Eins og tað sæst í royndarkanningini, sum varð gjørd í fjør heyst sum fyrireiking til ta stóru fólkateljingina seinni í ár, eru spurningarnir bæði nógvir og ymiskir.

Alt frá spurningum um, hvussu húskið er samansett, til hvat mál, ið tosað verður mest har heima.

Alt frá spurningum um matískoytið, sum húsarhaldið hevur útvegað sær, til tal av kømrum í húsunum.

Eisini eru eymari spurningar í spurnarblaðnum. Til dømis verður spurt, hvussu høg húsaleigan er, hvussu heilsan er í mun til aldurin og um viðkomandi hevur systkin ella hálvsystkin í útlondum.

## Stríðir við grundlógina

Í samband við spurnabløðini - sum skulu útvega hagtøl, sum Hagstova Føroya tekur sær av - er ætlanin at senda fólk út at banka á dyr og soleiðis syrgja fyri, at hvørt húski og einstaklingur í Føroyum útfyllir spurnabløðini.

Longu her er fyrsta ivamálið. Tí sambært uppskotinum skulu fólkini – sonevndu teljararnir – fáa heimild til ein serligan "rætt at koma á gátt í hús hjá privatum og onnur støð, har fólk búgva og uppihalda sær", sum tikið verður til í uppskotinum.

- Tey fáa rætt til at trampa inn á gólvið hjá fólki. Sjálvt ikki løgreglan hevur ta heimildina, sigur Jørgen Niclasen úr Fólkaflokkinum, sum er harðliga ímóti ætlanini.

Fólkafloksformaðurin, sum eftir at hava umrøtt uppskotið í fíggjarnevndini mælir frá at samtykkja uppskotið saman við Bill Justinussen, vísir á, at uppskotið í hesum føri stríðir við § 72 í grundlógini, sum sigur, at "boligen er ukrænkelig".

Og tað er ikki bara Jørgen Niclasen og Bill Justinussen, ið halda, at uppskotið stríðir við grundlógina.

Tað ger Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðiligur ráðgevi hjá løgtingsumsitingini, eisini.

"Sambært § 72 í grundlógini er bústaðurin friðhalgaður... ein og hvør eigur tí at hava rætt til at nokta, at ein myndugleikapersónur kemur inn í hús sítt," skrivar Birita Ludvíksdóttir millum annað í einum notati, sum er hjálagt álitinum, sum Fíggjarnevndin hevur skrivað um uppskotið.

Notatið hjá løgfrøðiliga ráðgevanum er ein lang uppremsan av óhepnum orðingum og feilum, sum standa í uppskotinum, sum meirilutin í Fíggjarnevndini annars mælir til at samtykka.

## Einki at óttast

Men hvørki Jørgen Niclasen ella Birita Ludvíksdóttir nýtast at óttast fyri at fáa óboðnan gest á dyr í heyst.

Tað lovar Øssur Winthereig, sum er kunningarráðgevi fyri verkætlanini Manntal.

- Tað, at teljari kann koma á gátt, merkir, at hann kann koma til dyrnar, banka uppá og siga ørindini, sum eru at heinta spurnarblað og kanna, at spurningarnir eru svaraðir. Teljarin hevur tó ongan rætt at tvinga seg inn í heimið hjá fólki ímóti teirra vilja. Um fólk ikki sjálvi bjóða teljaranum innum, avgreiðir teljarin ørindini í hurðini, durinum ella gongini, sigur Øssur Winthereig, sum vísir á, at tað ongantíð hevur verið ætlanin at ganga ímóti § 72 í grundlógini.

Kunningarráðgevin hjá Manntali lovar samstundis, at fólkini, sum banka uppá, eru sína uppgáva vaksin. Hann vísir í hesum samanhangi til viðmerkingarnar í lógaruppskotinum sum siga, at "teljararnir skulu - umframt at vera myndugir - eisini vera egnaðir til arbeiðið. Hetta merkir eitt nú, at tey, sum verða sett í starv, skulu vera álítandi, skilja týdningin av trúnaði, skilja markið millum at koma á gátt og rættin hjá einstaklinginum í egnum bústaði."

## Fáa bót fyri ikki at svara

Fyri at umfatandi fólkateljingin skal geva nakra meining, er neyðugt, at øll eru við. Tí er neyðugt at lóggeva, at øll hava skyldu at svara teir mest grundleggjandi spurningarnar í spurnablaðnum.

Jørgen Niclasen skilir væl sjónarmiðið. Men hann er alt annað enn fegin um orðingina í uppskotinum, har lagt verður upp til, at tey, sum nokta at svara, kunnu revsast við bót.

Tingmaðurin úr Fólkaflokkinum heldur – eins og Bill Justinussen - tað vera óneyðugt at gera so álvarslig inntriv í privatlívið hjá einstaka borgaranum í Føroyum, at ein verður revsaður við bót, um ein av einhvørjari orsøk ikki ynskir at svara einum spurningi í spurnarblaðnum.

Teir báðir, sum saman mynda minnilutin fíggjarnevndini í hesum máli, halda, at uppskotið í hesum føri stríðir við artikul 8 í evropeiska mannarættindasáttmálanum, sum m.a. sigur, at einhvør hevur "rætt til virðing fyri sínum privatlívi og familjulívi."

Í sáttmálanum stendur víðari, at almenni myndugleikin einans kann gera inntriv í henda rættin í heilt serligum førum, tað veri seg "fyri at tryggja tjóðina, almenna tryggleikan ella fíggjarligu vælferðina í landinum, at fyrbyrgja órógv ella brotsverk ella at verja heilsuna ella siðastandin ella at verja rættindi og frælsi hjá øðrum".

Løgfrøðiligi serfrøðingurin úr løgtingsumsitingini er samd við minnilutanum í fíggjarnevndini um, at ásetingin um revsing kann vera í stríð við evropeiska mannarættindasáttmálan, og hon heldur ikki, at nakað talar fyri, at inntrivið kann rættvísgerast.

"Tað er ilt at fáa eyga á, at tað er "neyðugt í einum demokratiskum samfelag" at áleggja einum privatpersóni bót, um hann av onkrari orsøk ikki ynskir at svara ávísum spurningum í spurnarblaðnum. Ásetingin kann vera í stríð við § 8 í europeiska mannarættindasáttmálanum," skrivar Birita Ludvíksdóttir í notatinum.

Hon mælir tí til at strika tann partin í uppskotinum, sum snýr seg um at revsa við bót.

## Í lagi at revsa

Kunningarráðgevin hjá Manntali er ikki samdur við løgfrøðiliga ráðgevan á løgtingsskrivstovuni ella minnilutanum í fíggjarnevndini um, at tað er skeivt at revsa tey, sum ikki vilja svara spurnablaðnum.

- Av royndum veit man, at tað ikki letur seg gera at fáa øll at svara, um tað verður sjálvboðið fyri borgarar at svara. Tí er tað mett neyðugt at áleggja fólki at svara spurningunum, sigur Øssur Winthereig.

Hann metir - í mun til løgfrøðiliga ráðgevan – at inntrivið er forsvarligt.